# Best um húsdjór verða avlívað hjá djóralækna

**– Eg mæli fólki til at fara til ein djóralækna, um tey ætla sær at avlíva eina kettu ella ein hund. Tað er tað tryggasta og besta at gera, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Lars Mohr Nielsen, djóralækni, sigur, at teir avlíva alt fleiri djór fyri fólk**

AVLÍVING

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað kann vera trupult av avlíva ein hund ella eina kettu – serliga um tað er eitt djór, sum tú hevur havt eitt tætt forhold til í nógv ár, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni*

Fólk, sum ætla sær at avlíva eitt húsdjór, skulu fara til djóralækna fyri at fáa tað gjørt.

Tað heldur landsdjóralæknin Bjørn Harlou.

– Eg mæli fólki til at fara til ein djóralækna, um tey ætla sær at avlíva eina kettu ella ein hund. Tað er tað tryggasta og besta at gera, sigur hann.

Í sambandi við eitt rættarmál um avlíving av einum hundi, gjørdi dómarin í Føroya rætti í farnu viku greitt, at frameftir merkir tað 30 daga treytaleysa fongsulsrevsing, um onkur avlívar eitt djór á óforsvarligan hátt.

– Við hesum gjørdist dómarin greitt, at tað er ikki longur í lagi at taka lívið av djórum á ein óforsvarligan hátt. Tað bar kanska til at drukna eina kettu fyri 30 árum síðani uttan at fáa revsing, men soleiðis er tað ikki longur. Nú kunnu fólk rokna við 30 daga fongsulsrevsing, um tey gera tað, segði Linda Margrethe Hesselberg, politiassessor, við Sosialin leygardagin.

### Kann vera trupult

Landsdjóralæknin Bjørn Harlou heldur, at besta loysnin er at fara til ein djóralækna, um eitt húsdjór skal avlívast.

– Tað kann vera trupult av avlíva ein hund ella eina kettu – serliga um tað er eitt djór, sum tú hevur havt eitt tætt forhold til í nógv ár.

– Tað ber til at skjóta tey, men tað skal vera fólk, sum duga við vápn, og so skulu tey heldur ikki ivast, tá ið tey skulu skjóta, tí annars kann tað enda við forferdiligar lamskjóting, sigur landsdjóralæknin.

### Avlíva nógv djór

Lars Mohr Nielsen, djóralækni í Havn, sigur, at ein alt meira vanlig uppgáva hjá djóralæknunum er avlíving av húsdjórum.

– Tað koma nógv fólk til okkara fyri at fáa avlíva eitt djór, og eisini bøndur biða okkum avlíva djór fyri seg, sigur hann.

Avlívingin hjá djóralækna verður framd við sproytum. Fyrst fær djórið eina sproytu, sum tað sovnar av, og síðani verður tað avlívað við ein sproytu beinleiðis inn í hjarta.

– Eg vil mæla fólki frá at fara undir at avlíva djór, um tey ikki kenna seg fullvís, at tey ella tann, sum tey biða gera avlívingina fyri seg, kunnu gera tað á forsvarligan hátt. Djórið skal doyggja beinanvegin, og tað kann gerast við at skjóta djórið í høvdið, men tað er einki serliga tespiligt, og tað skal ikki kiksa, sigur Lars Mohr Nielsen.

Hann heldur sum landsdjóralæknin, at best er, um ein djóralækni avlívar djórið.

# Breiði vegurin skal røkka longur út

**FT Samskifti ætlar sær næsta árið at fáa breiðband-internetið longur út kring landið, og við endan av næsta árið skulu 96 prosent av bygdum øki verða dekkað. Tá roknar FT Samskifti við, at talið á breiband-haldarum kann verða tvífaldað**

INTERNET

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*

Í hesum døgum ger FT Samskifti eitt stórt átak við nýggjum prísum og hægri ferð á breiðband-interneti. Men tað eru fólk kring landið, sum ikki kunnu verða við í internet-gildinum.

Fólk í bygdum sum Viðareiði, Hvannasundi, Nólsoy, Húsavík og Sumba eru millum tey, sum ikki enn eru umfata av tilboðnum um breiðband frá FT Samskifti.

– Vit hava lagt eina ætlan fyri útbyggingar í hesum árinum og næsta ár. Tá ið 2006 er komið at enda, rokna vit við at røkka millum 95 og 96 prosent av bygdum øki í landinum, sigur Richard Mortensen, stjóri í FT Samskifti.

### Talið kann tvífaldast

Bygdirnar, sum nú standa fyri tørni at sleppa út á tann breiða internet-vegin, eru Viðareiði, Norðdepil, Hvannasund, Depil, Norðtoftir, Funningsfjørður, Nólsoy, Haldarsvík, Kvívík, Skálvík, Húsavík, Fámjin og Sumba.

Í løtuni eru 3.300 hald av breiðbandi í landinum – tá ið allir veitarar eru taldir við – men FT Samskifti roknar við, at hetta talið verður nógv hægri um hálvtannað ár.

– Tað er ein øgiligur áhugi fyri at fáa breiðband í hesum døgum, og hetta er eitt tað størsta vakstrarøkið hjá okkum. Gongur alt, sum vit ætla, so kunnu tað verða tvífalt so nógvir breiðband-haldarar síðst í 2006, sum tað eru í dag, sigur Richard Mortensen.

Hi-Fi

Stórt úrvæl av hátalarum og forsterkarum

damor

LG DR7400 DVD brennari



1.898,-

DVD brennari frá LG í góðari góðsku. Fá upp til 6 tímar á eina DVD fløgu. Spælir nógv ymisk format sum t.d. DVD±R/RW, mp3, jpeg fløgur og mangt annað

LG combi DVD/video



1.598,-

Nú ber til at sleppa sær undan tveimum kassum til DVD og Video. Bæði í einum kassa og alt í sínum stílfullum sniði. Er einans 78 mm høgur. Umframt DVD spælir hann eisini DivX filmar

JVC bilstereo KD-G111



1.198,-

Simpult bilstereo frá JVC við fløguspælara. 4x45W

Føroya størsta úrval av bilstereo!!!

Alt til serligar upplatingarprísir



Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor